# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, Rólant í Skorini talar. Barnaansing er samstundis. www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Í summarfrítíðini er broytt gudstænastuætlan.
Leygardagin kl. 11 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus og Hebrearabrævið.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Pater Jude Kulas Soosaiappu í Mariukirkjuni.

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Leygardagin After Eight, høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóhan P. Johannesen. Sunnudagsskúlin er í summarfrí, lýst verður, tá byrjað verður aftur.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hanus Simonsen.

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Ætlanin er fara útferð sunnudagin, lýst verður nærri á heimasíðuni, www.livdin.fo

**Royndarhúsið í Nólsoy**
Fríggjakvøldið kl. 21 Evangel. møti.
Leygardagin kl. 14 Barnamøti, kl. 16 Útimøti í Geilini um viðrar, Evangel. møti kl. 20.
Sunnudagin útimøti í Geilini um viðrar kl. 14.30, Evangel. møti í Royndarhúsinum kl. 16. Herman og Gigga syngja. Tórmund og fleiri luttaka.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Telefonandaktin 424741.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 19 Møti við Egil Toftegaard o.fl.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Møti verður í fimleikarhøllini í Glyvra Skúla leygarkvøldið kl. 20 við Hans Berndtsen.
Sunnudagin verður møti kl. 19.
Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20 Spælicafé.
Sunnudagin kl. 11 Møti við André Matras (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Frá KFUM og K, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími við Øssur Kjølbro.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Felagsmøti í kirkjuni, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen, ymiskar sangkreftir luttaka. Innsavnan.
Sunnudagin um viðrar verður útimøti kl. 15.30, um ikki verður møti inni kl. 18 við Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen, ymiskar sangkreftir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Árna og Jeannu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið, Vágur**
Møti sunnukvøldið kl. 18 við Snorra Brend, trúboðara í Mali. Greitt verður frá missións- og radioarbeiðnum millum Fulanarar, eins og høvi verður at seta spurningar. Innsavnin verður fyri Ytrimissiónsarbeiðið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Konsert fríggjadagin 4. juli kl. 15 við Irving Anckers Sekstet. Irving Anckers Sekstet spældu í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn í 50-unum. Aftaná fimti ár, er orkestrið aftur samla. Orkesterið spæli tey somu góðu løgini.
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 6. juli verður gingið niðan á Tind og Egilsfjall. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havi heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Heilaskaðaráðgeving**
Hevur tú spurningar um heilaskaðar, afturvenjing ella annað, so ber til at skriva til okkara á "NeuroCom, FO 400 Oyrarbakki", at senda teldupost til: info@neurocom.dk ella at ringja til 225 263.
NeuroCom, Oyrarbakki

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
MBF skrivstovan verður stongd frá mánadegi 14. juli til 10. august.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Javni**
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

## PRÓGV

Maria Kristiansdóttir Rasmussen, Kollafjørður, hevur frá Íðnskóla Íslands í Reykjavík tann 18. juni 2003 tikið prógv sum Klædnahandverkari við konufólkaklæðum sum sergrein.

Jóannis Fonsdal, Skála, hevur lokið prógv sum cand. theol. á Københavns Universitet.

## 70 ÁR

10. juli verður Niels Jacob Erlingsson, Akureyri, 70 ár. Veitslan verður hildin leygardagin 12. juli í Missiónshúsinum í Hvalba kl. 18.00. Hann vónar at hitta væl av familju og kenningum har. Tey, ið vilja heilsa uppá hann henda dagin verða biðin um at siga frá á tlf. 321309 ella 212309 innan mánadagin 7. juli



## FILMSTEIGURIN

# Bruce Mikli

**(Bruce Almighty): Tá Bruce slapp at verða Gud – og vita, um hann dugdibetur…**

Bruce Nolan starvast sum reportari á lítlu sjónvarpsstøðini, Eyewitness News TV í Buffalo, NY. Hann er mest kendur fyri at gera lítil, stuttlig gerandisinnsløg og er milt sagt ikki glaður fyri arbeiði sítt. hann vil nógv heldur verða tíðindavertur – ella í minsta lagið at gera spennandi tíðindainnsløg úr altjóða brennideplu,.

Í veruleikanum er Bruce ikki bert ónøgdur við arbeiði hjá sær. Hann er ónøgdur við stórt sæð alt í lívi sínum, og hann nýtir eitt hvørt høvi til at brokka seg alment um støðu sína. Ikki ein gong genta hansara, tann vakra Grace, kann betra um sinnisstøðu hansara. Men hóast negativu støðu hansara elskar Grace hann kortini yvir øllum á jørðini.



Eydnan er kortini við Bruce, tá honum verður boðið at verða reportari frá árligu live-sendingini frá gitna flotbátinum Maid of the Mist. Bruce sær straks møguleikan fyri at vísa, tað hann kann, men lagnan vil tað øðrvísi. Júst sum sendingin byrjar, verður annonserað, at tann nýggi tíðindaverturin verður ringasti fíggindi hjá Bruce. Tað sortnar hjá Bruce eina løtu, men síðani – framman fyri milliónum av hyggjarum – lesur hann nógva eiðir, sum so avgjørt ikki hóska seg í sjónvarpi.

Tað, sum kundi verði stóri dagurin hjá Bruce, verður til hansara verstu marru. Hann fær fótin frá sjónvarpsstøðini, og á veg heim verður hann álopin av einum búllaharkaliði, sum bankar hann og sorlar bilin hjá honum sundur. Í øðini vendir Bruce sær – nærmast í avmakt – til Vorharra og forbannar hann, men so hendir nakað! Ein røð av mystiskum hendingum føra Bruce til ein gamla goymslubygning, har duravørðurin presenterar seg sum ongan verri enn Vorharra. Hann gevur Bruce tað ultimativa tilboðið: Sjálvur at gerast Vorharra við hartil hoyrandi guddommiligu megi og vita, um hann kann gera taðbetri!







Fríggjadagin 04.07. kl. $19^{00}$
Fríggjadagin 04.07. kl. $23^{30}$
Leygardagin 05.07. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 06.07. kl. $19^{30}$
Fríggjadagin 04.07. kl. $21^{15}$
Leygardagin 05.07. kl. $19^{00}$
Leygardagin 05.07. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 06.07. kl. $22^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 04.07. kl. $18^{30}$
Leygardagin 05.07. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 06.07. kl. $21^{30}$
Fríggjadagin 04.07. kl. $23^{00}$
Leygardagin 05.07. kl. $23^{00}$




Fríggjadagin 04.07. kl. $20^{45}$
Leygardagin 05.07. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 06.07. kl. $19^{00}$

**P BIO P**
**KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**